

www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 02 - 2012

# Dátur frá Brugduboringini leysgivnar

Jarðfeingi upplýsir á heimasíðu síni, at tað nú hevur leysgivið dáturnar frá boring 6104/21-1, vanliga nevnd Brugdanboringin, tí boringin ikki longur er fevnd av ásetingunum um trúnaðarskyldu. Boringarnar hava vanliga eitt 5-ára trúnaðarskeið. Boridáturnar kunnu fáast við at venda sær til Jarðfeingi. Brugdanbrunnurin varð boraður í 2006 við boripallinum Stena Don. Tað var Statoil, sum stóð fyri tí boringini. Ì summar verður farið undir enn eina Brugduboring, Brugdan 2, skamt frá tí brunninum, sum varð boraður fyri fimm árum síðani. Úrslitið av tí fyrra Brugdubrunninum var, at borurin rendi seg fastan og mett var ikki, at tað loysti seg tá at fara longur niður í undirgrundina. Kortini vóru tá tekin um gass niðast í boriholinum skiltist eftir, at úrslitið av boringini varð greitt. Hesaferð er ætlanin at koma nógv longur niður í Brugdan 2 brunninum, sum verður boraður nakrar fáar kilometrar í ein sunnan og eystan frá Brugdu 1 brunninum. Brugdan 2 verður borað við pallinum COSLPioneer. Ætlanin er at seta á í summar. Mynd - COSLPioneer, sum skal bora Brugdan 2 í summar